| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 25. oktober 2007 |
| Býráðsfundur nr. | 12/2007 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2007 tann 25. oktober kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 19. oktober 2007 um innkalling til fundar.

**<u>Møtt vórðu:</u>**
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Signar á Brúnni
Elisabeth D. Eldevig Olsen
Eyðun á Lakjuni
Tórfríður Abrahamsen
Petur Abrahamsen
Gordon M. Petersen

Gordon M. Petersen møtti sum varalimur fyri Jann Toftegaard, sum sambært fráboðan tann 23. oktober 2007, sigur, at hann verður burturstaddur uttanlanda og ynskir, at varalimurin tekur sæti sína vegna.

Jón Nolsøe Olsen møtti ikki á fundinum, og hevur heldur ikki latið fráboðan inn til borgarstjóran um, at hann hevur fráveru.

Skrivari: Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**<u>Mál nr. 67/2007.</u>**

***Viðvíkjandi eykajáttan til viðlíkahald og rakstur av skúlanum konto 400104-400199.***

Fíggjarnevndin hevur móttikið skriv frá kommunalu umsitingini, dagfest 18. september 2007, hvar greitt verður frá, at neyðugt at heita á býráðið um at veita eina eykajáttan í sambandi við "Blokk 1 skúlin", sum umfatar el-,olju-, tryggingar-, innbúgv- og viðlíkahaldsútreiðslur, harímillum ísetan av nýggjum vindeygum.

Blokkurin svarar tíverri ikki til nýtsluna í ár, eitt nú grundað á at meira verður brúkt til vindeygu, innbúgv, viðlíkahald enn avsett er á fíggjarætlanini fyri 2007.

Avsettar eru kr. 950.000,00 til blokkin, men verður roknað við at nýta kr. 400.000,00 aftrat í ár til hesar meirútreiðslur.

Skotið verður upp, at fíggingin verður útvegað av konto 445010 "Útbygging og projektering av skúlanum", har kr. 2,1 mió eru avsettar og lítið og einki brúkt higartil í ár.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, so skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri, og skal endaliga viðgerðin verða kunnað Innlendismálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftan á samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2,3 í somu lóg.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 19. september 2007, og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan upp á kr. 400.000,00 til omanfyri nevndu endamál, og at henda verður fíggjað av konto 445010 "Útbygging og projektering av skúlanum".

Nevnda eykajáttan ber ikki eykaútreiðslur við sær fyri kommunukassan, tá ið talan í hesum føri verður um eina umflyting av játtan undir øki 4 "Skúla- og mentamál".

Málið hevur verið til viðgerðar á býráðsfundi tann 27. september 2007 og varð samtykt at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og beina málið um eykajáttanina til 2. og endaliga viðgerð á komandi býráðsfundi, sum verður 25. oktober 2007.

**Avgerð:**

Samtykt varð við 2. viðgerð at góðkenna eykajáttanina, hetta tilmælinum frá fíggjarnevndini frá 19. september 2007. (7 atk. fyri 1 atkv. ímóti. Ímóti atkvøddi Signar á Brúnni).

**<u>Mál nr. 68/2007.</u>**

***Viðvíkjandi eykajáttan til rakstur av brunaverkinum konto 230000-239995.***

Fíggjarnevndin hevur móttikið skriv frá kommunalu umsitingini, dagfest 18. september 2007, hvar greitt verður frá, at neyðugt at heita á býráðið um at veita eina eykajáttan til rakstur av brunaverkinum, grundað á at avsetingin ikki svarar til nýtsluna higartil í át, m.a. at meira verður brúkt á konto "Skeiðsvirkseim 230072", "Amboð brandstøðin 230040" og konto !"Brunastjóraløn 230050".

Til skeiðvirksemi eru avsettar kr. 20.000,00 og higartil í ár eru nýttar kr. 110.000,00, hetaa grundað á, at nógv nýggj brunafólk eru sett í starv í ár fyri fólk, sum av eini ella aðrari orsøk eru farin úr starvi. Til skeiðvirksemi er brúk fyri eini eykajattan upp á kr. 140.000,00 til konto 230072.

Ein tangabilur er útvegaður og nýggir hjálmar við headsett eru keyptir til brunaliðið, soleiðis at kr. 30.000,00 vænta á konto 230040 "Amboð". Talan verður sostatt um eina eykajáttan upp á kr. 30.000,00.

Starvið sum brunaleiðari er normerað soleiðis, at konto "Brunastjóraløn 230050" upp á kr. 110.000,00 er kr. 30.000,00 ov lág, og tí má ein eykajáttan upp á nevndu upphædd neyðug.

Talan er sostatt um eina samlaða eykajáttan av brunaverkinum í bólki 2 upp á tilsamans kr. 200.000,00 í 2007.

Skotið verður upp, at eykajáttanin verður fingin til vega av meirskattainntøku A+B fyri 2007.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, so skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri, og skal endaliga viðgerðin verða kunnað Innlendismálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftan á samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2,3 í somu lóg.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 19. september 2007, og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan upp á kr. 200.000,00 til omanfyri nevndu endamál, og at henda verður fíggjað av konto 860005.

Nevnda eykajáttan kemur at bera eykaútreiðslur við sær fyri kommunukassan upp á kr. 200.000,00, og kemur sostatt at ávirka rakstrarúrslitið fyri 2007 við nevndu upphædd.

Málið hevur verið til viðgerðar á býráðsfundi tann 27. september 2007 og varð samtykt at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og beina málið um eykajáttanina til 2. og endaliga viðgerð á komandi býráðsfundi, sum verður 25. oktober 2007.

**Avgerð:**

Samtykt varð við 2. viðgerð at góðkenna eykajáttanina, hetta tilmælinum frá fíggjarnevndini frá 19. september 2007. (8-0).

**<u>Mál nr. 69/2007.</u>**

**Viðvíkjandi sparkivølli á Hellunum.**

Í sambandi við at UEFA helt sín 50 ára stovningardag í 2005, fór Fótbóltssamband Føroya í holt við eina sparkivallarætlan. Hetta verður gjørt á tann hátt, at UEFA stuðlar limalondunum við í mesta lagi 4,8 mió. kr. til at gera sparkivallir kring landið.

Í hesum sambandi hevur Fótbóltssambandið boðað kommununi frá, at tað hevur sett sær sum mál at stuðla umleið 40 vallum komandi 4 árini. Hesir verða lagdir kring landið, og verða ætlandi gjørdir í samstarvi við kommunur, landsmyndugleikar og vinnulívið.

Fótbóltssambandið upplýsti, at kommunurnar útvega lendið til vallirnar, ið helst skal vera nær skúlum, barnagørðum vm., og at kommunurnar gera undirlendið klárt, stoypa fundament til girðing og mál og bera kostnaðin av girðingini rundan um vøllin, meðan F.S.F. útvegar og áleggur fyrstafloks graslíki og ber kostnaðin og uppseting av girðingn og málum.

Mælt verður til, at gera vallirnar í støddini 13 metrar x 21 metrar, tó kunnu teir verða gjørdir størri tó max. 1000 fermetrar.

Mentamálanevnd býráðsins hevur á fundi tann 29. september 2005 samtykt at søkja Fótbóltssamband Føroya um fíggjarligan stuðul til 2 sparkivallir, sum ætlanin er at fara undir at gera í kommununi, og er hetta gjørt við umsókn, dagfest 13. oktober 2005.

Talan var um vallir á hesum økjum:

- Spæliøkið á Kambsdali sum er nærindis Frítíðarskúlanum.
- Økið oman fyri skúlan sum ídag verður nýtt sum parkeringspláss.

Fótbóltssambandið játtaði kommununi ein sparkivøll í 2006, og varð hesin lagdur á spæliøkið á Kambsdali til gleði og gagn fyri íbúgvar og onnur, sum koma á vitjan á dalinum. FSF bar útreiðslurnar av standardvølli + at tilfari til girðing um vøllin.

Kommunan hevur tann 07. september 2007 síðani fingið í tilboði frá Fótbóltssambandinum at fáa ein vøll aftrat í kommununi, men av tí at aðrar ætlanir eru við økinum oman fyri skúlan hevur mentamálanevndin eftir áheitan frá Hellunevndini frá 03. juli 2007 tikið avgerð um at arbeiða fram ímóti at leggja ein standard vøll á Hellunum ístaðin.

Í hesum sambandi hevur fundur verið millum umboð fyri býráðið og Hellunevndina á Hellunum tann 18. september 2007 um møguliga plasering av sparkivøllinum í bygdini, og mettu Hellufólk besta økið til endamálið verða oman fyri Bønhúsið á matr. nr. 937 og sethúsini hjá Jonnu Johannesen á matr. nr. 927, sí hjálagda kort yvir økið.

Kommunan hevur fingið upplýst frá Fótbóltssambandinum, at graslíkistilfarið verður latið kommununi av UEFA miðskeiðis í oktober 2007, og tí er neyðugt at arbeiða skjótt við málinum, m.a. við at fáa neyðugt lendi til keyps frá eigarunum. Kommunan hevur somuleiðis fingið upplýst frá FSF, at hetta er seinasta umfar, sum graslíki + gjald fyri girðing verður latið kommunum frá UEFA gjøgnum FSF, grundað á at allir 40 vallirnir eru útlutaðir, og um kommunan ikki tekur av, so fær annar umsøkjari vøllin í boði ístaðin.

Ætlanin er at leggja sparkivøllin á matr. nr. 898 og 901, og hevurr kommunan við skrivi, dagfestum 21. september 2007 heitt á eigararnar av nevndu økjum um at selja kommununi neyðugt lendi ávikavist 426 og 946 fermetrar fyri kr. 75,00 fyri fermeturin. Sostatt verður samlaði keypsprisurin fyri matr. nr. 898 kr. 31.725,00 og fyri matr. nr. 901 kr. 70.950,00 ella tilsamans kr. 102.675,00, sum fíggjaður verður av kontoini til "lendiskeyp".

*Eigararnir av matr. nr. 898 eru:*

1. Jofrit Jensen, sum eigari av matr. nr. 175a, ¼
2. Sólbjørn Jensen, sum eigari av matr. nr. 227a, ½
3. Eivind Hansen, sum eigari av matr. nr. 132a, ¼

*Eigararnir av matr. nr. 901 eru:*

1. Bertha Joensens arv, matr. nr. 43a, 1/8
2. Sámal Andrew Hansen, sum eigari av matr. nr. 89, ¼
3. Zacharia Eliasen ofl., sum eigarar av matr. nr. 17a, 43/562
4. Napoleon Joensen, sum eigari av matr. nr. 243, 3/8
5. Jaspur Bjartalíð, sum eigari av matr. nr. 11a, 30/562
6. Hálvdan Mohr, sum eigari av matr. nr. 15a, 30/652
7. Harley Joensen, sum eigari av matr. nr. 192, 30/652
8. Haldor Nielsen, sáli, sum eigari av matr. nr. 12a, 30/652

Sambært skrivinum varð eisini heitt á eigararnar, um góðtikið verður at selja, at geva kommununi loyvi til skjótast at fara inn á økið fyri at gera neyðugt fyrireikingar herundir planeringsarbeiði, so klárt er at taka ímóti graslíkinum. Av royndum taka ognarbroytingar rúma tíð, tá ið talan er um frábýtir av lendum við treytaðari samanlegging við øðrum matrikuli, sum í hesum føri matrikuli kommunan er ánari av.

Eftir fyriliggjandi hava allir eigararnir av matr. nr. 898 svara játtandi, meðan Jaspur Bjartalíð, sum eigari av matr. nr. 11a ikki hevur svarað aftur, hóast áminningarskriv er sent honum tann 11. oktober 2007. Kommunan hevur ikki møguleikar fyri at taka leggja vøllin á tann 15. oktober 2007, men møguleiki er fyri at fáa fólk frá týsku verksmiðjuni at koma seinni, men tá má kommunan bera kostnaðin av hesum, møguliga saman við øðrum, sum eru í somu støðu sum vit.

Málið hevur aftur verið til viðgerðar á fundi í mentamálanevndini tann 17. oktober 2007, og mælir nevndin einmælt fíggjarnevndini/býráðnum til, at sparkivøllurin verður lagdur á økinum matr. nr. 898 og 901 oman fyri Bønhúsið á matr. nr. 937 og sethúsini hjá Jonnu Johannesen á matr. nr. 927 á Hellunum, hetta sambært hjáløgdu tekning frá teknisku deildini.

Staðfest er, at eingin peningur er avsettur á fíggjarætlan kommununar til kommununar part av útreiðslunum til sparkivøllin, og tí verður neyðugt, um arbeiðið skal verða gjørt í inniverandi fíggjarári, at heita á fíggjarnevndina/býráðið um at veita eina eykajáttan upp á kr. 250.000,00, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri.

Grundað á omanfyri standandi loyvir nevndin sær hervið einmælt at heita á fíggjarnevndina um at veita eina eykajáttan upp á kr. 250.000,00, og at málið verður lagt fyri býráðið tann 25. oktober 2007

til viðgerðar bæði viðvíkjandi "*leggjan av sparkivølli á Hellunum*", og 1. viðgerð av møguligari eykajáttan til arbeiðið.

Fíggjarnevndin hevur móttikið tilmæli frá mentamálanevndini, dagfest 17. oktober 2007 um gerð av sparkivølli á Hellunum, og at neyðugt verður við eini eykajáttan upp á kr. 250.000,00, um vøllurin skal verða gjørdur í inniverandi fíggjarári. Á fíggjarætlan kommununar fyri 2007 er eingin upphædd avsett til sparkivøllin, sum upprunaliga varð ætlaður til at verða lagdur á parkeringsøkið, og tí metir nevndin rættast at koma við hesi umbøn til fíggjarnevndina.

Kommunan hevur keypt neyðugt lendi oman fyri ognirnar matr. nr. 937 og 927 á Hellunum til endamálið fyri tilsamans kr. 102.675,00, og er lendiskeypið fíggjað av kontoini "lendiskeyp" undir tekniska økinum (øki 3), og kemur lendiskostnaðurin tessvegna ikki at ávirka kommunalu útreiðslurnar av sparkivøllinum á roknskaparliga økinum undir øki 4.

Talan er sostatt um eina samlaða eykajáttan av økinum " Skúla- og mentamálum" í bólki 4 upp á tilsamans kr. 250.000,00 í 2007.

Kommunala fyrisitingin hevur viðgjørt málið, og mælir í notati, dagfestum 18. oktober 2007 fíggjarnevndini til, at eykajáttanin kr. 250.000,00, um hon verður játtað, verður fingin til vega av konto 445010 "Útbygging/projektering skúlin", hetta sambært § 41, stk. 1 og 2 í kommunustýrislógini. Á hesi konto vórðu upprunaliga avsettar kr. 2.100.000,00, meðan ein eykajáttan upp á kr. 400.000,00 varð til 1. viðgerð á býráðsfundinum 27. september 2007, har talan varð um flyting av nevndu upphædd til rakstur/umvælingar av skúlanum.

Talan verður sostatt um umflyting/eykajáttan av hesi í sama bólki nevniliga bólki 4: Skúla- og mentamál.

Mett verður, at avsetta upphæddin kr. 2,1 mió. – møguligar eykajáttanir kr. 650.000,00 ella kr. 1.450.000,00 neyvan verður nýtt fult út í inniverandi fíggjarári.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, so skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri, og skal endaliga viðgerðin verða kunnað Innlendismálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftan á samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2,3 í somu lóg.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 19. september 2007, og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan upp á kr. 250.000,00 til kommunalu útreiðslurnar av sparkivøllinum á Hellunum undir øki 4 "Skúla- og mentamál, og at henda verður fíggjað av konto 860005.

Nevnda eykajáttan kemur ikki at bera eykaútreiðslur við sær fyri kommunukassan, og kemur sostatt ikki at ávirka rakstrarúrslitið fyri 2007.

**Avgerð:**

Broytingaruppskot frá Signari á Brúnni um at beina málið aftur í mentamálanevndina fyri at finna hósakandi økið til sparkivøllin í Fuglafirði, fall. (2 atkv. fyri, 5 atkv. ímóti og 1 atkvøða varð blonk. Ímóti atkvøddu Sigurð S. Simonsen, Dánjal Vang, Elisabeth D. Eldevig, Eyðun á Lakjuni og Gordon M. Petersen. Blankt atkvøddi Petur Abrahamsen).

Tilmælið frá mentamálanevndini um at leggja sparkibvøllin á Hellunum varð samtykt. (5 atkvøður fyri, 2 atkv. ímóti og 1 atkv. blonk. Ímóti atkvøddu Signar á Brúnni og Tórfríður Abrahamsen. Blankt atkvøddi Petur Abrahamsen).

Samtykt at beina viðgerðina av eykajáttanini til 2. viðgerð á býráðsfundinum 29. november 2007. (6 atkv. fyri og 2 atkv. ímóti. Ímóti atkvøddu Signar á Brúnni og Tórfríður Abrahamsen).

**Mál nr. 70/2007.**

**Eykajáttan til rentur og avdráttir av lánum 2007.**

*Fíggjarnevndin hevur móttikið skriv frá Kommunalu umsitingini, dagfest 10. oktober 2007 um møguligar neyðugar eykajáttanir, sum útgreinaðar eru niðanfyri:*

**Rentur konto 700010**
Í samtyktu fíggjarætlanini fyri 2007 eru kr. 1.717.975 settar av til rentuútreiðslur.
Avsetingin svarar ikki til framroknaðar rentur við ársenda 2007, sum verða kr. 2.195.884. Sostatt vanta **kr. 478.000** til rentur fyri 4. ársfj. í 2007.

Orsøkin til, at kommunan skal gjalda so nógv meir í rentum enn avsett er í fíggjarætlanini er tann, at metingin varð ov lág – lán upp á kr. 12.000.000 er tikið í árinum – har rentan er hægri enn roknað varð við, tá fíggjarætlanin varð løgd.
Eisini er rentan upp á lánið á kr. 15.000.000, sum varð upptikið til 3,897% í 2006 hækkkað til 5,61% í 2007.
Eisini er rentan yvirhøvur hækkað í 2007 upp á øll lán hjá kommununi við skiftandi rentusatsi.

**Avdráttir konto 830010**
Í samtyktu fíggjarætlanini fyri 2007 eru kr. 5.874.000 settar av til avdráttir av lánum.
Avsetingin svarar ikki til framroknaðar avdráttir við ársenda 2007, sum verða kr. 6.350.013. Sostatt vanta **kr. 476.000** til avdráttir fyri 4. ársfj. í 2007.
Orsøkin til, at kommunan skal gjalda so nógv meir í avdráttum enn avsett er í fíggjarætlanini er tann, at kommunan skal gjalda kr. 300.000 í avdrátti upp á lánið upp á kr. 12.000.000, sum er upptikið í ár.

Ætlanin var ikki at gjalda avdráttir fyrr enn frá 01. januar 2008. Eisini skal kommunan avdraga kr. 215.000 meir enn ætlað upp á lán úr Føroya Banka frá ár 2000, sum hevur verið avdráttarfrítt í nøkur ár, tí kommunan hevði goldið ov nógv niður upp á tað lánið yvir skattaavrokningina. Mett varð, at kommunan ikki skuldi gjalda meir enn 3 avdráttir av hesum láni í 2007, men bankin hevur roknað avdráttirnar frá 1. ársfj. Í 2007.

Sostatt er talan um at veita eina eykajáttan upp á kr. 478.000 til rentur á øki 7 "Rentur" og kr. 476.000 til avdráttir av lánum á øki 8 "Avdráttir av lánum". Tilsaman ein eykajáttan upp á kr. 954.000.

Mælt verður til at eykajáttanin til rentur og avdráttir í 2007 verður fíggjað av meir skattainntøku í 2007.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, so skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri, og skal endaliga viðgerðin verða kunnað Innlendismálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftan á samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2,3 í somu lóg.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 19. september 2007, og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan upp á kr. 954.000,00, útgreinað soleiðis at kr. 478.000,00 verða játtaðar til "Rentur" í øki 7, meðan kr. 476.000,00 verða játtaðar til avdráttir í øki 8 "Avdráttir av lánum".

Eykajáttanin verður fíggjað av meirinntøku av A+B skatti konto nr. 860005.

Nevnda eykajáttan kemur at bera eykaútreiðslur við sær fyri kommunukassan, og kemur sostatt at ávirka rakstrarúrslitið fyri 2007.

**Avgerð:**

Samtykt varð at beina málið til 2. og endaliga viðgerð á býráðsfundinum 29. november 2007. (8-0).

**<u>Mál nr. 71/2007.</u>**

***Viðvíkjandi eykajáttan til umsorganararbeiði á Vesturstovu.***

Fíggjarnevndin hevur móttikið skriv frá sosialu nevndini, dagfest 05. juli 2007, har heitt verður á nevndina og býráðið um at veita eina eykajáttan upp á kr. 238.000,00 til umsorganararbeiði á Vesturstovu fyri árið 2007.

Grundgevingin fyri hesi umbøn er, at kommunan hevur fingið noktandi svar frá Almannastovuni upp á umsóknina um stuðul til aktivering av teimum eldru á Vesturstovu, somuleiðis sum Føroya kærustovnur ikki hevur givið kommununi viðhald í kæruni tíverri. Sostatt er staðfest, at kommunan kemur at bera allar útreiðslur av aktiveringini í 2007, sum partvíst er framd.

Tó skal verða viðmerkt, at útreiðslurnar eru staðfestar í góðkendu fíggjarætlanini fyri kommununa fyri 2007, meðan metti stuðulin frá Almannastovuni tíverri ikki verður goldin.

Talan er sostatt um eina samlaða eykajáttan av økinum " Almanna- og heilsumálum" í bólki 5 upp á tilsamans kr. 238.000,00 í 2007.

Kommunala fyrisitingin hevur viðgjørt málið, og mælir í notati, dagfestum 19. oktober 2007 fíggjarnevndini til, at eykajáttanin kr. 238.000,00, um hon verður játtað, verður fingin til vega av innistandandi peningi kommununar, hetta sambært § 41, stk. 1 og 2 í kommunustýrislógini.

Talan verður sostatt um eykajáttan í bólki 5: Almanna- og heilsumál.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, so skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri, og skal endaliga viðgerðin verða kunnað Innlendismálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftan á samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2,3 í somu lóg.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 19. september 2007, og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan upp á kr. 238.000,00 til aktivering á Vesturstovu konto 520257 (inntøkur) undir øki 5 "Almanna- og heilsumál, og at henda verður fíggjað av innistandandi peningi.

Nevnda eykajáttan kemur at bera eykaútreiðslur við sær fyri kommunukassan, og kemur sostatt at ávirka rakstrarúrslitið fyri 2007.

**Avgerð:**

Samtykt varð at beina málið til 2.  og endaliga viðgerð á býráðsfundinum 29. november 2007. (8-0).

**<u>Mál nr. 72/2007.</u>**

**Viðvíkjandi sethúsunum hjá Obert Eliasen á matr. nr. 422.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Advokatvirkinum, dagfest 14. september og 02. oktober 2007, um kommunan er sinnað at keypa sethúsini hjá Obert Eliasen, sála á matr. nr. 422 í Fuglafirði og matr. nr. 423, sum Sámal Eli Eliasen, sáli er ánari av.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 17. oktober 2007, og mælir nevndin til at bjóða kr. 700.000,00 fyri ognirnar.

Málið hevur somuleiðis verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 19. oktober 2007, og mælir nevndin býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá teknisku nevndini um at bjóða kr. 700.000,00 fyri ognirnar, men at ein umbøn um møguliga eykajáttan ikki verður viðgjørd í nevndini, fyrr enn kommunan ítøkliga fær ábendingar um, at ognirnar verða seldar kommununi.

**Avgerð:**

Tilmælini frá teknisku nevndini og fíggjarnevndini vórðu samtykt. (6 atkv. fyri 2 atkv. ímóti. Ímóti atkvøddu Signar á Brúnni og Tórfríður Abrahamsen).

**<u>Mál nr. 73/2007.</u>**

***Viðvíkjandi leigusáttmála millum KFUM- og K skótarnar í Fuglafirði og kommununa.***

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá sosialu nevndini, dagfest 08. oktober 2007, har heitt verður á kommununa um legusáttmála partann millum fyri ognirnar matr. nr. 338 og 339 í Fuglafirði at nýta sum spælistovu hjá dagrøktini, nú dagrøktin, sum hildið hevur til í "Luffustovu" í mong ár er heimleys í løtuni.

Talan er um leigumál við gildiskomu tann 01. november 2007 at fara úr gildi tann 31. juli 2009, tá ið nýggi dagstovnurin á Kambsdali eftir ætlan verður tikin í nýtslu. Leigugjaldið er ásett sambært § 9, stk. 1 til kr. 5.000,00 um mánaðan ella kr. 60.000,00 árliga.

Somuleiðis heitir sosiala nevndin á fíggjarnevndina um at játta neyðugan pening til leigu og rakstur av skótahúsinum umleið kr. 15.000,00 fyri november og desember 2007, og til broytingar og krøv fyri, at dagrøktin kann nýta húsið (uttanumøki vm.) upp á kr. 15.000,00 ella tilsamans kr. 30.000,00.

Sambært teknisku deildini verður kostnaðurin av hegning av uttanumøki vm. mettur til kr. 20.000,00, so talan verður um eina samlaða útreiðslu upp á kr. 35.000,00 í mun til kr. 30.000,00.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 19. oktober 2007, og mælir einmælt býráðnum til at góðkenna fyriliggjandi uppskot til leigusáttmála millum kommununa og KFUM- & K skótarnar í Fuglafirði við gildiskomu tann 01. november 2007.

Somuleiðis ***samtykti*** nevndin, at kr. 15.000,00 í rakstrarútreiðslum frá 01. november h.á. verða fingnar til vega við sparingum  kontoum hjá dagrøktini´, meðan tær kr. 20.000,00 til ymisk krøv eitt nú uttanumøkið verða fingnar til vegna við sparingum/ikki nýttum játtaðum í bólki 5: "Almanna- og heilsumál".

**Avgerð:**

Samtykt varð at gókenna fyriliggjandi uppskot til leigusáttmála, hetta sambært tilmælum frá sosialu nevndini og fíggjarnevndini. (8-0).

**<u>Mál nr. 74/2007.</u>**

***Viðvíkjandi broytan av leigusáttmála við Fuglafjarðar heimavirkisfelag.***

Mentamálanendin hevur tann 17. september 2007 havt fundi við Odvør á Lakjuni sum umboð fyri Fuglafjarðar heimavirkisfelag í sambandi við ymisk mál, sum hon sambært skriv, dagfest 14. august 2007 ynskti at tosa við nevndina um.

Eitt av málunum varð leigusáttmálin millum kommununa og felagið fyri matr. nr. 671b "Piddasahandil/Riberhús",, dagfestur 08. apríl 2005, har vart m.a. verður gjørt við § 5, stk. 3 og við § 3, stk. 1, sum ávikavist hava við sjálva leiguna og við leiguáramáli at gera.

Felagið ynskir, at § 5, stk. 3 verður strokin, og at longdin av leigumálinum sambært § 3, stk. 1 verður óuppsigiligt í 20 ár, ístaðin fyri 10, frá 01. mars 2005 at rokna. Broyting verður sambært hesum tann, at leigusáttmálin ikki gongur út tann28. februar 2015 men tann 28. februar 2025 ístaðin. Orsøkin fyri hesi áheitan er, at tey meta seg eitt sindur ótrygg við so stuttum leigumáli, tá ið tey av góðum grundum ikki vita, hvat hendir kommunalpolitiskt, eftir 28. februar 2015.

Mentamálanevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 04. oktober 2007, og mælir nevndin einmælt býráðnum til at ganga áheitanini frá Fuglafjarðar heimavirkisfelag á møti. Viðvíkjandi § 5, stk. 3 er at siga, at henda grein er broytt í leigusáttmálanum millum kommununa og P/F Højgaards handilsvirki, hetta í sambandi við, at hvør partur nú rindar fyri sína el- og oljunýtslu.

Nevndin er eisini av teirri meting, at leigusáttmálin upp á 10 ár, sum undirskrivaður varð við felagið tann 04. oktober 2005, er alt ov stuttur, og mælir nevndin tessvegna býráðnum til, at leigusáttmálin verður broyttur til 20 ár frá 01. mars 2005 at rokna, og kemur at ganga út tann 28. februar 2025.

**Avgerð:**

Tilmæli frá mentamálanevndini varð samtykt við tí broyting, at leigumálið verður yvir 15 ár ístaðin fyri 20, sum skotið er upp av mentamálanevndini. (7 atkv. fyri 1 atkv. ímóti. Ímóti atkvøddi Tórfríður Abrahamsen).

**<u>Mál nr. 75/2007.</u>**

**Leigusáttmáli við P/F Alilaks fyri matr. nr. 882g.**

Havnanevndin hevur frá fyrisitingini móttikið uppskot til leigusáttmála millum Fuglafjarðar kommunu og P/F Alilaks fyri matr. nr. 882g. Talan er um lendi á Vestara landinum uttan fyri Ísvirki.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í havnanevndini tann 17. oktober 2007, og mælir nevndin býráðnum til, at fyriliggjandi leigusáttmáli verður góðkendur.

**Avgerð:**

Tilmæli frá havnanevndini varð samtykt. (8-0).

**<u>Mál nr. 76/2007.</u>**

**Tilboð frá SP/F Bjargni um upptøku av djórum.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá SP/F Bjargni, dagfest 28. september 2007, har felagið bjóðar seg fram at hava eftirlit og upptøku av húsarhaldsdjórum. 3 tilbúgvingarpakkar eru við:

1. Goldið verður kr. 2,00 pr. íbúgva í kommununi pr. mánaða, og eru teir tá tøkir at fara út, tá ið boð eru frá kommununi ella løgregluni.
2. Goldið verður kr. 3,00 pr. íbúgva í kommununi pr. mánaða, og eru teir tá tøkir at fara út, tá ið boð eru frá kommununi ella løgregluni, somuleiðis sum teir koyra fyribyrgjandi túrar runt í kommununi allar dagar.
3. Goldið verður kr. 300,00 hvørja ferð, teir verða tilkallaðir ella taka dýr upp, og er hetta eitt gjald, sum kommunan kann senda víðari til eigaran av djórinum.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 17. oktober 2007, og mælir nevndin býráðnum til ikki at taka av omanfyri nevndu tilboðåum, men ístaðin siga avtaluna upp við Gøtu- og

Leirvíkar kommunur, og síðan lata verandi aktingarmann halda áfram við upptøku av djórum í Fuglafjarðar kommunu.

**Avgerð:**

Samtykt varð at siga avtaluna við Gøtu- og Leirvíkar kommunur um upptøku av leysgangandi djórum upp, og at verandi aktingarmaður kommununar framyvir bert kemur at átaka sær upptøkur av leysgangandi djórum í Fuglafjarðar kommunu. Fráboðan verður send Føroya landfúta um hesi viðurskifti.

Somuleiðis varð samtykt ikki at taka av tilboðnum frá SP/F Bjargni, dagfest 28. september 2007 um upptøku av djórum. (8-0)

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.45.

Dánjal Vang

Signar á Brúnni

Elisabeth D. Eldevig

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Tórfríður Abrahamsen

Gordon M. Petersen

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Jákup Frants Larsen